# Sjódepil á Drelnesi

**Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður, hevur skotið upp fyri tinginum upp at brúka saltsiloina á Drelnesi til sjósavn, ella sjódepil, sum hann nevnir tað**

ÚTJAÐARAMENNING
*Edvard Joensen*



*Uppskot er nú komið í Løgtingið um at gera ein sjódepil í saltsiloini á Drelnesi*
*Mynd: Edvard Joensen*

Sjódepil á Drelnesi við akvarium og skipasavni kann vera ein gott ískoyti til útjaðaramenningina, tosað verður so nógv um, heldur Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður, sum hevur skotið upp fyri Løgtinginum at gera eitt slíkt savn í gomlu saltsiloini á Drelnesi.

– Hugskotið kom frá stjóranum á Feðraráðnum, Hera Niclasen, sigur Jóannes Eidesgaard. Sjálvur havi eg so borið tað niðan í Løgtingið.

Tað, sum hugskotsstillararnir kundu hugsað sær, er ein depil har eitt nú skipasøga og akvarium saman við møguleikum fyri mentanarligum tiltøkum eru. Eisini ber til at hava matstovu á staðnum, vísir Jóannes Eidesgaard á.

Hann nevnir, hvussu gjørt verður aðrastðani og undrast á, at einki sjósavn er í Føroyum.

– Taka vit Danmark sum dømi, hava tey har ein rúgvu av slíkum støðum, hóast tað, at fiskivinnan í mun til samfelagið annars bara er ein heilt lítil partur, og ikki sum hjá okkum næstan alt, sigur hann.

At tað kann tykjast onkrum at liggja avsíðis, heldur hann ikki vera nakran trupulleika.

– Tað er bara ein spurningur um at innstilla seg. Tað er at fara umborð á eina nýggja ferju og ferðast hálvanannan tíma ella so. Alt er á sama staði, sum ferjan leggur at. Og so verður kortini møguleiki at ferðast víðari í oynni.

Suðuroyggin hevur ligið frammalaga í fiskivinnuni, og eitt nú í slupptíðini var hon mestsum alt. Einki hava vit varðveitt at kalla frá teirri Tíðini, sum jú er grundarlagið undir samfelag okkara í dag. So upplagt hevði tað verið at havt eitt slíkt savn júst her, vísir Jóannes Eidesgaard á.

Eisini er sjálvur bygningurin nakað fyri seg. Fólk við skili fyri slíkum siga, at hendan konstruktiónin við boðaðum betongelementum er sera sjáldsom. Fáir slíkir bygningar eru til yvirhøvur, og her hjá okkum er bara tann eini. Tí er hann eisini áhugaverdur og eigur at verða varðveittur.

Men slíkt skal eisini fíggjast, og tað má so gerast ein landsuppgáva. Og júst her er tað so at útjaðarapolitikkurin kemur uppí. Tí ein slíkur depil hevði verið upplagdur at drigið ferðafólk til Suðuroynna, vísir Jóannes Eidesgaard á.

## Lív er í fýrstaðnum

**Um vikuksiftið kemur fólk frá felagsskapinum Focolare í Keypmannahavn til Føroya at vitja. Møti verður hildin sunnudagin**

VITJAN

Fólk frá tvørkirkjuliga felagsskapinum Focolare koma til Føroya um vikuskiftið. Fundir verða hildnir her sunnudagin.

Focolare, sum merkir fýrstaður, er altjóða kristiligur felagsskapur, sum arbeiðir við at at sameina fólk uttan mun til trúarligan, sosialan ella politiskan uppruna, sum Jesus sjálvur ynskti tað, verður sagt í tíðindaskrivi frá felagsskapinum.

Lida van Dijk og Elma Streit frá Focolare í Keypmannahavn fara at siga frá royndum og upplivingum sínum við at bera evangeliið fram í gerandisdegnum. Tær fara eisini at siga frá um samskifti við fólk úr ymsum kristiligum samkomum eins og fólk úr øðrum trúalærum.

Tær bjóða fram ein lívsstíl, sum kann geva ískoyti til frið í nærumhvørvinum og við tí eisini í heiminum øllum, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Sunnudagin 23. mars verður møti klokkan 14.30 og andakt klokkan 17.00. Drekkamunnur verður at fáa, siga fyrireikararnir í Føroyum. Tiltøkini verða í Mariukirkjuni í Havn.

**ej**

# Fleiri tunnilskanningar

**Avgjørt er at gera fleiri kanningar, áðrenn rættiliga verður farið undir at bora tunnil millum Øravík og Hov**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*



*Nakrar kanningar skulu gerast enn, áðrenn hovbingar sleppa at koyra gjøgnum fjallið til Øravíkar*
*Mynd: Edvard Joensen*

Fleiri kanningar skulu gerast av undirlendinum, áðrenn farið verður undir at bora tunnilin í Suðuroy, sigur landsverkfrøðingurin.

Tað eru ymsar meiningar um, hvar best er at leggja nýggja tunnilin millum Øravík og Hov. Landsverkfrøðingurin hevur eina linju, meðan annað felag, NCC, heldur at betri er at leggja tunnilin aðra leið.

Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur, sigur, at reint ferðslutekniskt er tann leiðin, sum NCC heldur vera ta røttu, betri at leggja tunnilin.

At hann so ikki bara utan nakað hóvasták verður lagdur har, kemst av, sigur Oyvindur Brimnes, at landsverkfrøðingurin hevur fingið greiðar ávarðingar um, at jarðfrøðiliga er tann linjan verri enn hin, sum landsverkfrøðingurin heldur, at tunnilin skal hava.

Tí er gjørt av at biða eitt norskt serfrøðingarfelag, O.T. Blindheim, um at gera nýggjar kjarnuboringar fyri at staðfesta, hvussu lendið er, sigur landsverkfrøðingurin.

– Vit meta tað óforsvarligt bara uttan víðari at fara undir at gera tunnilin aðrastaðni, enn ætlað. Tí hava vit gjørt av at gera nýggjar kanningar, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann sigur, at ætlandi vera kanningar, projektering og annað slíkt fyrireikingararbeiði liðugt í summar ella heyst, so bjóðast kann út seinni í ár. Miðað verður eftir at fáa ein fastpríssáttmála, sigur hann.

Men alt hongur á løgtingsmonnum. Tí anleggslógin er ikki samtykt enn, og eingin veit heldur, hvussu verður við samferðsluhavnini á Drelnesi, sum tosað hevur verið um at brúka grót úr tunlinum til.



# Hvørt orð skal vigast

*Birita á Løgmansbø Bláhamar, sum er við í sendingini Robinson hjá TV3, dámar ikki so væl, sum henni hevði væntað. – Meginpartin av tíðini er tað als ikki stuttligt. Tað er óbehagiligt, fólk baktala og eru følsk, sigur hon*
*Mynd: TV3*



**Enn er Birita á Løgmansbø Bláhamar millum tey 14, sum eru eftir í Robinson aspiranterne hjá TV3. Fýra vikur av upptøkum í Danmark eru eftir, áðrenn funnið verður útav, hvør sleppur út á oydnu oynna. Útlitini sóu døpur út mánakvøldið, men longu nú er sólin komin undan kavi aftur, og Birita hevur sjálv góðar vónir**

ROBINSON
*Ingrid Bjarnastein*

Tey, sum sóu Robinson mánakvøldið, vita, at útlitini hjá føroysku Biritu á Løgmansbø Bláhamar sóu døpur út. Hon fekk 11 atkvøður av 15, og gjørdist tískil ein av tveimum, sum varð løgd í hendurnar á hyggjarunum. Hon og ein, sum eitur Kenneth sótu í heitu stólunum mánakvøldið, tá hyggjararnir skuldu gera av, hvør teirra skuldi sendast heim. Birita yvirlivdi hesuferð, tí donsku hyggjararnir vildu, at hon skuldi fáa ein møguleika afturat.

– Nú gongur fínt. Uptøkurnar hava gingið væl, og stemningurin er nógv broyttur síðani mánakvøldið, sigur Birita Bláhamar í telefonini, tá Sosialurin fekk fatur á henni á hotellinum í Keypmannahavn.

Birita fekk mánakvøldið ógvuliga harða mótstøðu frá sínum liðfeløgum. Hørð orð vórðu slongd út í luftina, og alt var heldur ikki so pent, sum liðfelagarnir vildu vera við.

– Eg havi tosað við Niels og nøkur av hinum, og tey hava tikið væl ímóti mær aftur í bólkinum. Kritikkurin var harður, men tað nyttar onki at spæla firtin. Nú eri eg vald innaftur, og tað ber ikki til hjá mær at halda meg aftur, sigur Birita.

### Gingið væl

Birita sigur, at tað hevur ikki so nógv at siga fyri seg, hvat hini siga um hana.

– Kappingin hesuferð gekk væl fyri mítt viðkomandi, og hetta hevur eisini gjørt, at liðfelagarnir hava sæð meg á ein annan hátt. Eg havi eisini roynt at vera meira við í bólkinum, greiðir Birita frá, sum í seinastu sending kundi tykjast at halda seg í so nógv fyri seg sjálva.

Robinson ekspeditiónin er hesuferð broytt í mun til undanfarnu fimm ekspeditiónir. Hesuferð innleiðandi umfør, um ein so kann siga, fram í Danmark, áðrenn tey útvaldu verða send út á eina oydna oyggj onkrastaðni í Asiu.

– Hetta er ikki so stuttligt, sum eg hevði væntað. Tað er strævið, langar upptøkur og uppreklamerað. Kappingarnar eru stuttligar, men restin er alt á lágum støði.

Hvønn mánadag koma aspirantarnir, sum tey verða kallað, til góðsið har tey búgva. Ur og telefonir verða tikin frá teimum, so tey vita onki um, hvør tíð á døgninum tað er. Hetta alt fyri at gera trýstið harðari.

– Viðhvørt fáa vit onki at eta, so vit fara í holt við upptøkurnar við tómum maga. Hetta verður gjørt fyri, at vit skulu vera meira irriterað og sinnalagið eitt sindur ringt, greiðir Birita frá.

### Týdningarmikið

Birita hevur áður sagt, at tað var av tilvild, at hon teknaði seg til Robinson. Og hetta er tí ikki eitt av tí týdningarmesta, sum hon ætlar sær at útynna her í lívinum.

– Hini ganga ógvuliga høgt uppí spælið. Teir vilja gera, hvat tað skal vera fyri at sleppa við út á oynna. Tað er munurin á okkum. Eg taki hetta ikki eins og tey. Fyri tey er hetta upplivilsið, sum tey skulu fortelja fyri ommu- og abbabørnunum, og tí gera tey nógv meira burturúr og tað gerst ekstremt. Eg eri púra køld yvirfyri tí.

Um danirnar sigur Birita annars, at tey eru »ræðuliga droy«. Liðið er ikki samansett av persónum, hon sjálv hevði funnið uppá at valt at verið saman við.

– Fólkini eru følsk. Tey baktala teg, stemma uppá teg, og so aftaná, so koma tey yvir til tín og siga, at tey eru kedd av, at tey stemmaðu uppá teg. Eg orki ikki fyri tí. Tú kanst ikki líta á nakran!, sigur føroyski luttakarin.

Birita fortelur annars, at tá hon er til upptøkur má hon ansa væl eftir, hvat hon sigur. Hvørt orð má vigast væl og virðiliga áðrenn tað verður sagt.

– Eg kann til dømis ikki siga, at mær leingist eftir børnunum hjá mær, tí so blaka tey meg út og fara at siga, at eg longdist alla tíðina.

### Óbehagiligt

– Meginpartin av tíðini er tað als ikki stuttligt. Tað er óbehagiligt, fólk baktala og eru følsk, sigur Birita.

Stórur munur er eisini á hesuferð, tí nú fáa luttakarnir møguleika at síggja sendingarnar so hvørt sum tær eru gjørdar. Tað kundu tey ikki í undanfarnu ekspeditiónum.

– Hetta ger stóran mum. Úti á oynni kundi tú siga tað, tú vildi og ongin fekk tað at vita fyrr enn fleiri mánaðir aftaná. Nú síggja vit alt, sum øll siga um okkum. Tað er rættiliga hart. Sum til dømis mánakvøldið. Tá stóð nógv á, og tú mást bara royna at hava eitt pokerfjes, men tað kann vera ringt. Men sum eg segði í sendingini, so verður tú bara sterkari av mótgangi.

Sum fleiri helst hava lagt til merkis, so kundi Birita tykjast, sum hon helt seg nógv fyri seg sjálva í mánakvøldssendingini.

– Eg valdi sjálv at halda meg aftur. Eg klári ikki, tá fólk eru følsk. Men alt gongur longu betri nú. Útlitini eru góð, og ljóskastarin er vendur frá mær nú. Eg gjørdi ein lítlan innsats hesuferð, og beinanvegin vendi ljóskastarin ein annan veg, fortelur Birita.

– Soleiðis broytist tað allatíðina. Eg sat har í gjár, og var ein hataður persónur, og hesuferð gekk tað nógv betri. Nú eru bara fýra vikur eftir av upptøkum, so nú byrjar tað at gerast spennandi, sigur Birita á Løgmansbø Bláhamar at enda úr telefonini úr Keypmannahavn.